## DAGSINS MEINING

# Eitt dapurt minni

Í gjár vóru liðin seksti ár síðan, Reyði herurin tók kz leguna Auschwitz í Polen og fangarnir, ið har enn vóru lívi, vórðu leysir. Frá tí Auschwitz lat upp og til tann 26. januar 1945 var ein millión menniskju tikin av døgum á hesum ræðuliga staði. Nógv tey flestu av hesum neyðars menniskjum vóru jødar. Tilsamans vóru 6 milliónir av jødum tiknir av døgum í kz legum í sjálvum Týsklandi og í londum, sum vóru hersett av nazistisku hermegini.

Dagurin hevur verið hildin við minningarhaldi í Auschwitz, har ríkisleiðarar, forsætisráðharrar og fólk, sum yvirlivdu ræðuleikarnar, komu saman fyri at minnast, sýna samkenslu og fyri at vátta fyri umheiminum, at slíkt sum hendi her fyri meira enn seksti árum síðan, má ongantíð henda aftur. Gerhard Schrøter, kanslari, hevur vegna týsku tjóðina biðið jødiska fólkið um fyrigeving. Hetta er í tøkum tíma, tí fyri tað fyrsta so hevur tað gingið sera trekt hjá týsku tjóðini at viðurkenna sær ábyrgdina av fortíðini og fyri tað annað, so eru tey flestu, sum sótu í týsku kz legunum, nú deyð. Skuldu tey, sum enn eru á lívi hoyra hesum umbering, so mátti hon koma nú. Eisini franski forsetin Jaques Chiraq hevir biðið fronsku jødarnar um fyrigeving. Franska stjórnin, sum samstarvaði við Nazitýskland hjálpti til við at senda 90.000 franskar jødar til týningarlegurnar í Týsklandi og í tí hersetta Polen. Henda umbering kom eisini í tøkum tíma.

Hvat var tað so, sum í grundini hendi í kz legunum? Tað hendi hetta, at nazistiska leiðslan hevði sett sær fyri at týna eitt heilt fólk, jødarnar, fyri at reinska týsku tjóðina, sum sagt varð. Hetta nevnist í altjóða rætti fólkamorð ella genocide. Týningin gjørdist til ein ídnað. Endamálið var, at týna allar jødar í Europa. Til hetta endamál var gasskamarið tikið í nýtslu, og í Auschwitz vóru gasskamarini og krematoriini í virksemi samdøgurðið í kring heilt til Reyði herurin stóð uttan fyri grindina við tí blóðugt ironisku yvirskriftini ”Arbeit macht frei”. Auschwitz og allar hinar mongu legurnar prógvaðu fyri umheimi og fyri eftirtíð, at einki mark er fyri óndskapinum, um tað eydnast einum politiskum valdi at ómenniskjansligera eitt fólk, ein part av sínum egna fólki ella einahvørja hertikna tjóð. Hesi verða tá lýst sum verandi ikki-menniskju og so kann ein fara við teimum, sum ein vil. Tað var hetta ræðuliga, sum Hitler og hansara bølmenni megnaðu. Hetta er brotsverk móti mannaættini. Teir toppnazistar, sum vórðu tiknir eftir stríðslok, vórðu dømdir fyri brotsverk móti mannaættini og revsaðir Men nógvir sluppu undan og livdu í frið og náðum, tí kalda kríggið voldi, at hugurin at jagstra nazibrotsmenn hvarv. Bert gamli treiski nazijagstrarin Simon Wiesenthal helt á til tað síðsta ofta uppi móti sterkum og duldum kreftum ið royndu at forða honum í at fáa nazibølmenni handtikin.

Fólkamorðið skuldi ongantíð henda aftur! Men so varð ikki. Hesi seksti árini hevur heimurin upplivað fleiri dømi um ræðulig fólkamorð t.d. í Cambodia, í Yemen, í Ruanda, í londum, har kurdar búgva, og fyri stuttum á Balkan. Sekstiára minni um Auschwitz kann vónandi eggja mannaættini til at vera á varðhaldi, so ræðuleikarnir ikki endurtaka seg.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Fólkatingslimurin og heimssamfelagið

**Helena Dam á Neystabø**
*Javnaðarflokkurin*



VAL05

Heimurin er í dag so samansjóðaður - so globaliseraður - at bara tann sum ikki liggur sjóvarfallið av sær, men loftar teimum møguleikum, sum vísa seg, stendur seg í kappingini. Eitt av mongum vindeygum út í heim, átti at verið tann føroyska fólkatingsumboðanin.

Heldur enn at føra føroyskan tvídrátt millum tjóðveldi og samband niður á danating, til lítlan sóma fyri føroyingar, áttu okkara fólkatingsumboð at loftað teimum møguleikum, sum altjóða leikpallurin bjóðar fram.

Okkara fólktingsumboð skulu, sum eitt slag av uttanlandsumboðan, knýta sambond út í heim, sum kunnu fjøltátta okkara egna samfelag og sostatt inntøkugrundarlagið. Nýggj tøkni, nýggj vitan og nýggjar vinnur eru ikki hóttanir men avbjóðingar, sum kunnu menna vælferðarsamfelagið.

Og tað hendir nógv annað á altjóða leikpallinum, sum krevur at vit í Føroyum eru árvakin. Eitt dømi er EU-politikkurin, og leiklutur dana í hesum.

Ætlanir eru frammi um at samtykkja eina nýggja grundlóg fyri ES-samveldið, verður ein tílik ES-grundlóg samtykt fara danir helst at lata partar av sínum sjálvsavgerðarrætti til ES. Men hvussu verður við tí føroyska sjálvsavgerðarrættinum? Fer hann sama veg? Hetta eru spurningar og mál sum eitt føroyskt fólkatingsumboð eigur hava neyvt eftirlit við. Treytin er, at tann føroyski fólkatingslimurin er har, sum hann eigur at vera, í Fólkatinginum! At hon ella hann nýtir eitt og hvørt høvi at tryggja sær innlit, og áhaldandi og dagliga kunnar um føroysk áhugamál.

# FÓLKAATKVØÐU um ES-málið í 2005

**Kristina Háfoss**
*Fólkatingsvalevni*
*Tjóðveldisfloksins*



VAL05

Mest átroðkandi politiska málið, ið virkast skal til frama fyri á Fólkatingi - og í Føroyum - er at halda fólkaatkvøðu í Føroyum, samstundis sum danir fara til fólkaatkvøðu um ES-grundlógina.

ES-parlamentið hevur samtykt nýggja ES-grundlóg og alt bendir á, at Danmark í næstum fer at hava fólkaatkvøðu um at gerast partur av ES-grundlógini, og um at siga frá sær tey undantøk, ið Danmark nú hevur mótvegis ES. Alt bendir somuleiðis á, at danir fara at taka undir við hesum, og harvið verður valdið tá umræður eitt nú donsk og føroysk rættarmál, gjaldoyramál og uttanríkis- og trygdarmál flutt úr Danmark til ES.

Av tí at Føroyar hava latið donskum myndugleikum uppí hendur at umsita eitt nú rættarmál og uttanríkis- og trygdarmál, og danskir myndugleikar í næstum helst fara at lata hesi mál til ES at avgera, er alneyðugt at føroyingar taka støðu til hetta so týðandi mál.

Greiðasti mátin at geva føroyingum høvi at siga sína hugsan, er at halda fólkaatkvøðu í Føroyum um at taka heimildirnar tá umrædur rættarmál, uttanríkis- og trygdarmál v.m. heimaftur til Føroya, samstundis sum danskir myndugleikar flyta hesar heimildir til ES.

Føroyar eru ikki limir í ES og fáa tískil onga ávirkan á tey mál, ið verða avgjørd av og í ES. Hartil kemur, at møguleikin fyri at taka valdið, tá umrædur føroyskan uttanríkis- og trygdarpolitikk v.m. heimaftur, gerst eisini sera fjarur um hetta vald verður hjá ES heldur enn donskum myndugleikum í framtíðini.

Tí er tað so avgerandi neyðugt, at føroyingar fáa høvi at velja ímillum, um føroyskur uttanríkis- og trygdarpolitikkur v.m. skal rekast úr ES ella úr Føroyum í framtíðini.

Føroyingar mugu og skulu avgera lagnuna hjá hesum so týðandi máli fyri Føroyar.

Hetta skulu føroyingar fáa høvi til á fólkaatkvøðu - helst longu í 2005.

Les meira á heimasíðu míni: www.hafoss.com

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$


**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.